# Trøllini hava konsert í Klaksvík

**Fyrsta dagin í august verður stór konsert við Trølla Pætur, Trølla Ommuni, Trølla Ossa, Trølla Unganum, Nósa og Árnfríð og Rannvu Lútzen í Klaksvík**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Mikukvøldið 1. august verður stór trøllakonsert í Skálanum í Klaksvík. Við á konsertini verða Rannvá og Árnfríð Lútzen, og fara tær at syngja kendar sangir hjá Kulum Rótum.

Fyrireikararnir siga í tíðindaskrivi, at sjálvt um Trølla Pætur býr uppi á Háfjalli, so hevur man ikki sæð so nógv til hann í Klaksvík. Hann og omma hansara hava framført fleiri ferðir í Suðuroy, Havn, Vágunum og í Eysturoy, men í Klaksvík hevur hann ikki haft nakra rættuliga konsert.

Mikukvøldið 1. august er so ætlanin at savna øll trøllini saman og hava eina lívliga konsert í Skálanum. Trølla Pætur fer at syngja nakrar fittar sangir, meðan omma hansara fer at syngja nakrar heilt villar sangir.

### Italskt trøll

Av tí at tað eru nógv børn í Klaksvík sum enn ikki hava sæð Trølla Ungan, verður hann eisini við á konsertuni. Hann fer at syngja ein sang sum eitur Da Da Da.

Eitt heilt nýtt trøll er komi upp í trøllafamiljuna - tað er Trølla-Ossi. Trølla Ossi er eitt trøll sum hevur búð megin partin av tíðini í Italia, men á konsertuni fer hann at vísa sínar dygdir. Umframt Rannvu, Árnfríð og øll trølluni, verður eisini Nósi at síggja á konsertuni.

Eftir konsertina fáa øll børnini eina stóra plakat av Trølla Pætur í part. Til ber eisini at heilsa uppá trøllini og Nósa, og tey foreldur, sum hava myndatól við, kunnu eisini fáa eina mynd av trøllinum saman við teirra barni.

Konsertin verður í Skálanum í Klaksvík mikukvøldið 1. august kl. 19.00.

# Clickhaze noktar at spæla á ólavsøkukonsertini

**Fyriskipararnir av ólavsøkukonsertini og rockbólkurin Clickhaze eru ósamd um treytirnar, sum Clikchaze skal spæla undir, og tí fer Clickhaze ikki at spæla á stóru konsertini**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Størsta árliga rockkonsertin í landinum verður hildin uttan ein av fremstu og mest aktivu bólkunum í landinum í løtuni.

Ætlanin var, at Clickhaze skuldi verða ein av teimum 9 bólkunum, sum spæla á ólavsøkukonsertini, og bólkurin úr Eysturoynni er eisini á plakatini fyri konsertina.

Men hevur ein ósemja millum FUT, sum skipar fyri konsertini, og Clickhaze við sær, at Clickhaze æltar sær ikki á pallin undir ólavsøkukonsertini.

Partarnir eru ósamdir um treytirnar, sum Clickhaze skal spæla undir, og ein partur av trupulleikanum er fíggjarliga samsýningin fyri framførsluna.



*Clickhaze verður ikki við á ólavsøkukonsertini, hóast bólkurin stendur á plakatini.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Eingin annar bólkur

Bæði FUT og og umboð fyri Clickhaze váttað, at ósemjan hevur við sær, at Prix Føroyar vinnararnir ikki verða við á ólavsøkukonsertini í ár.

FUT ætlar ikki at senda boð eftir nøkrum øðrum bólki, tí átta aðrir bólkar fara at spæla á konsertini.

Høvuðsnavnið á konsertini verður Frændur, men afturat teimum eru nógvir kendir bólkar. Millum annað MC Hár, All that Rain og Týr.

Ólavsøkukonsertin verður í Kommunuskúlagarðinum fríggjakvøldið 27. juli, og atgongumerki fáast nú í forsølu kring landið.






# Stórt diskotek í Badmintonhøllini

**Á ólavsøku verður stórt DJ show í Badmintonhøllini. Ársins DJ fer at halda til har, og eisini verður skipað fyri ymiskum dansikappingum.**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Òlavsøkuaftan og ólavsøkudag verður stórt DJ show í Badmintonhøllini, og nógv verður gjørt burturúr.

Umframt stóra ljóðanleggið og nú eisini fullfíggjaða ljósshowið, verða ymsar dansikappingar á dansipallunum við Dr. FeelgooD sum showmaster.

Ársins DJ, Kári Annand Berg, eisini kendur sum DJ-Estevez, verður plátuvendari bæði kvøldini. Sum prikkurin yvir i´ið verður vitjan av einum gesti, sum fyrireikararnir ikki vilja avdúka frammanundan.

### Barnatiløk

Ólavsøkuaftan kl.18:00 ólavsøkudag kl. 14:00, verður eisini stórt barnashow við klovnum, gandakallum, sangi og dansi í Badmintonhøllini í Havn.

Klovnurin »Bukke« fer at undirhalda við nógvum stuttligum, har høvið verður at hjálpa Bukke úr ymiskum neyðstøðum.

Arnfríð Lutzen og Rannvá Lutzen fara saman við trimum dansigentum at framføra vælkendu løgini hjá Kulum Rótum, sum øll børn í Føroyum helst kenna, og eisini fara gandakallarnir Bobo og Fjotti á pallin. Umframt alskyns gandakynstur fara teir báðir eisini at gera ymisk balóndjór, sum verða givin burtur.

Angela, sum børnini helst kenna úr sjóvarpsendingini Fres verður frásøgukvinna til hesi rimmar tiltøk.



# Føroya Banki lækkar rentuna

**Í dag lækkar Føroya Banki rentustigina á innlánum við 0,25%. Flestu útlánsrentustigini lækka við p 0,25-0,5%**

BANKAVIRKSEMI
*Tíðindaskriv*

Frá í dag at rokna lækkar Føroya Banki rentustigini. Øll rentustigini á innlánum verða lækkað við 0,25%. Hetta sigur Føroya Banki í tíðindasrkivi fríggjamorgunin.

Eisini eftir rentulækkingina er rentan á samansparing í Føroya Banka á sama stigi sum – og í nøkrum førum hægri enn – rentan á peningamarknaðinum. Bara íløgur í langfreistað lánsbrøv geva hægri rentu enn bankans innlánsrentu. Men hesin munur verður útlíknaður fyr tey privatu við eini hægri skatting – og við einum størri váða.

Flestu útlánsrentustigini lækka við 0,25-0,5%.

1. veðrættaðar bústaðarlán við serligari góðari trygd lækka við 0,5%, soleiðis at besta rentan á veðlánum banbkans nú er 6% p.a. Fyri hini bústaðarlánini verður eingin rentubroyting. Meginparturin av bankans bústaðarlánum verður ávirkað av rentulækkingin.

Fyri øll onnur útlán og kredittir lækka rentustigini við 0,25-0,5%. Bestu rentustigini á billánum hjá Føroy Banka er eftir rentubroytingina 7% p.a.

Tað er bankans fatan, at rentustigini so líðandi vóru farin eitt sindur út av lagi í mun til galdandi marknaðarrentu. Við seinastu rentubroytingini hjá Nationalbankanum fyrr í mánaðinum eru diskontoin og tey leiðandi rentustigini í peningamarkanðinum fallin við 0,25% – í nøkrum førum nakað meiri – síðani bankin seinast broytti rentuna í oktober í 2000.

Rentumunurin – tað er munurin millum útlánsrentuna og innlánsrentuna – í føroysku peningastovnunum er so smátt komin á eitt lutfalsliga lágt stig. Grundað á hetta væntar Føroya Banki, at gongdin við at lætta um rentumunin, samstundis sum nýggj tænastugjøld verða løgd á tænastuveiting hjá peningastovnum, fer at halda fram.

# Hans Olaf á Oyri farin

Mikumorgunin 11. juli andaðist Hans Olaf á Oyri 76 ára gamal.

Hans Olaf var bóndasonur á Oyri og var borin til garðin, men hugurin var ikki so stórur fyri bóndayrkinum, so hann læt beiggjan Pól festa garðin.

Bert 16 ára gamal, fór Hans Olaf til Íslands í vinnu, sum so mangir aðrir føroyingar tá gjørdu. Hann var við at byggja flogvøllin í Reykjavík.

Heimafturkomin úr Íslandi royndi hann at fáa kjans við føroyskum fiskiskipi. Hetta eydnaðist, og í mong ár baldist hann á sjónum. Hann sigldi við Austerlits í mong ár, ið Bartal á Strondum førdi. Av øðrum skipum, hann var við, skulu nevnast Westvard Ho, Fame, Sundabúgvin, Norðstjørnan, Búgvin og trolarin Rádni.

Eftir mong ár á sjónum fór Hans Olaf at arbeiða á landi, mest í byggivinnuni. Hjá byggifelagnum Waagstein arbeiddi hann í mong ár. Hann var, á sjógvi og landi, ein álitismaður, raskur, gjørdi lítið burtur úr sær, og var avhildin av teimum, hann samstarvaðist við.

Hans Olaf var giftur við Pallu, ið var ættað úr Kvívík, dóttir Jóhan og Mariannu. Tey eiga sonin Sámal.



Fyri nøkrum árum síðani gavst Hans Olaf at arbeiða, hann hevði aldur til tað, men helst var tað heilsan, ið far farin at bila, ið gjørdi, at hann helt uppat. Hóast nógv nívdur av sjúku, so hoyrdu tú hann ikki gremja seg, hann var eitt sjáldsama tolið fólk, og heldur ikki vildi hann vera øðrum til byrðu. Seinnu árini versnaði sjúkan – lungnasjúka – og hóast tol, treiskni og mót, mátti Hans Olaf til seinast lúta.

Hans Olaf og Palla vóru altíð blíð og týð at koma inn á gátt hjá. Mangar vóru ferðirnar, vit gjørdu til Oyrar, meðan børn okkara vóru smá. Børnini føldu seg altíð væl í heiminum hjá Hans Olafi og Pallu. Tey dugdu so fram úr væl at fara við børnum – av sonnum barngóð fólk.

Hans Olaf var ein hóvligur maður, gekk altíð stillisliga um, altíð hugnaligur at vera saman við, men hevði sínar meiningar, ið hann bar sáttliga og siðiliga fram. Hann hevði eitt gott minni, dugdi væl at siga frá og var altíð áhugaverdur at lurta eftir. Á sín stillføra hátt kundi hann eisini vera sera skemtingarsamur.

Tað er altíð svart at missa ein av sínum kæru, men soleiðis er lívið einaferð, flest øll verða vit rakt av sorg – fyrr ella seinni. Hesaferð rakti sorgin serliga meint Pallu, Sámal og Danvør og børn teirra, ið stóðu honum næst, umframt onnur, ið stóðu honum nær. Ikki minst verða abbabørnini rakt, tí tey høvdu so nært tilknýti til abban og ommuna – Hans Olaf og Pallu. Hvønn einasta dag vóru tey hjá teimum, og hildu ómetaliga nógv av teimum, og vit kunnu siga, at hetta var teirra næsta heim.

Stutt áðrenn Hans Olaf andaðist, føldi hann á sær, at hann hevði ikki langt eftir. Meðan sjúkan nívdi harðast, tók hann í hondina á konuni og segði: Góða Palla, nú fari eg skjótt hið ani, tað merki eg, Jesus verður eftir hjá tær og tykkum.

Soleiðis var Hans Olaf, hevði altíð so stóra umsorgan fyri sínum næstu, sjálvt ta síðstu løtuna hann lá og stríddist.

Hans Olaf er farin. Saknurin kennist svárur. Orð í slíkum løtum hjálpa so lítið, tó fara vit at minna tykkum á, at tit eiga minnini um ein góðan mann, góðan pápa og ikki minst ein góðan abba – tey koma tit altíð at eiga. Gott er at kenna hitan frá hondum, ið sleptu.

Friður verður lýstur yvir minnið um Hans Olaf Debes.

**Gunnvør og Signar**

# Eurovision-bólkurin er mannaður

**Tað verða nakrir av fremstu tónleikarunum í landinum, sum fara at spæla í nýggja Eurovision Hit Band**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*



Tá Brøðurnir Olsen hava konsert í Havn leygardagin 4. august, fer ein ein føroyskur bólkur samstundis at spæla fyri fyrstu ferð.

Talan er um ein bólk, sum er serliga settur saman til hesa konsertina. Bólkurin verður róptur Eurovision Hit Band, og hann fer at spæla nakrar av kendastu og best dámdu Grand Prix sangunum gjøgnum árini. Millum hesar kunnu nevnast Waterloo, Hold me Now og Ein bischen frieden.

Sangarar í bólkinum verða Kim Hansen og Arnfríð Lutzen. Afturat teimum fara Magnus Johannessen, Kaj Johannesen, Johannus á Rógvu Joensen og Ólavur Øster at spæla. Harafturat verður eisini eitt kór í bólkinum.

Eurovision Hit Band fer at hita upp til Brøðurnar Olsen, sum verða høvuðsnavn á konsertini, sum verður hildin í ítróttarhøllini á Hálsi.

# Vestmenn hava hug á íslendska marknaðinum

**Føroyski countrybólkurin, Vestmenn, kundi hugsa sær at gjørt meira við íslendska marknaðin. Ein serlig fløguútgáva er ein møguleiki, heldur sangarin í bólkinum**



*Vestmenn kundu hugsa sær at gjørt eina serliga fløg0uútgávu til íslendingar*

Vestmenn vóru herfyri í Íslandi og spældi, og teir hava eisini spælt nakrar av sínum best kendu sangum inn á íslendskum.

Hetta hevur givið teimum blóð á tonna, og sangarin í bólkinum kundi hugsa sær, at Vestmenn gjørdu enn meira við íslendska marknaðin.

- Vit hava nakrar sangir á íslendskum, men eitt hugskot hevði verið at gjørt eina serliga fløgu til íslendska marknaðin, segði Ólavur Højgaard við sendingina Rák í Rás 2 týsdagin.

- Men tað er umráðandi, at vit hugsa okkum væl um, áðrenn vit fara undir eina útgávu í Íslandi, legði hann afturat.

Vestmenn vóru sera væl nøgdir við ferðina, sum teir gjørdu til Íslands fyri kortum.